


## Gjaldoyraráðgevi

Vit vilja menna okkara tænastu á gjaldoyraøkinum, og tí søkja vit eftir einum kundaráðgeva, sum skal fremja handlar og røkja okkara kundar. Tú kemur at virka á fíggjarmarknaðunum kring heimin og skalt tí fylgja við í altjóða fíggjarheiminum.
Vit vænta, at tú ert ágrýtin, framsøkin og dugir væl við tølum. Tú hevur útbúgving, sum hevur tilknýti til fíggjarheimin t.d. bankaútbúgving.
Tú dugir sjálvandi væl enskt í skrivt og talu.

## Gjaldoyraserfrøðingur

Vit vilja vera fremst innan gjaldoyru í Føroyum og søkja tí eftir einum ráðgeva við royndum á gjaldoyraøkinum.
Tú hevur royndir við gjaldoyrafutures, -optiónum og -swaps og dugir sjálvandi væl enskt í skrivt og talu.
Tú fært avgerandi týdning fyri gjaldoyraøkið hjá Kaupthing Bank og fær yvirskipaðu ábyrgdina fyri okkara kundum og gjaldoyrastrategi.

## Vit bjóða

Vit bjóða eitt spennandi starv í eini livandi fyritøku í støðugari menning. Millum starvsfólkini er gott samstarv og ein góður andi, og tú kemur at virka í einum fakliga dugnaligum og avbjóðandi umhvørvi. Er okkurt at spyrja um viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jan Otto S. Holm, deildarstjóra, á 551503 ella jan.otto@kaupthing.com.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. januar 2008.

Kaupthing Bank, Bókbindaragøta 8, Postboks 3090, 110 Tórshavn

Tú kanst eisini søkja starvið á www.kaupthing.fo

---

Kaupthing Bank er ein norðurevropiskur banki, sum veitir munagóðar, fíggjarligar heildarloysnir til fyritøkur, stovnar og privatpersónar. Kaupthing Bank er slóðbrótari í føroyska fíggjarheiminum innan fyri virkisøkini ráðgeving og handil við virðisbrøvum. Kaupthing Bank er virkin í 12 londum - í øllum Norðurlondunum umframt Luksemburg, Sveis, Stóra Bretlandi, USA, Dubai og Qatar.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK
*Hugsa øðrvísi*